## DAGSINS MEINING

# Klovningur í Sjálvstýrisflokki?

Hóast lítil hevur Sjálvstýrisflokkurin havt stóran týdning í føroyskum politikki, tí hann so oftani hevur verið tungan á vágskálini, tá samgongur eru skipaðar. Hetta hevur so eisini givið flokkinum stórt vald. Eitt nú fekk hann tveir landsstýrissessir eftir valið. Somuleiðis má sigast, at andlit floksins úteftir, Helena Dam á Neystabø, hevur megnað at seta flokkin í rampuljósið eins væl og teir stóru flokkarnir. Ikki kann sigast annað enn at henda framstandandi kvinnan í føroyskum politikki hevur dugað at marknaðarført seg og flokk sín.

Nú brast so enn ein politisk bumba. Nýggi og ungi sjónvarspmaðurin, sum hevur gingið gott í beinið á øðrum miðili, fekk her sítt ársins scoop, tá hann solo kundi boða Føroya fólki frá, at oddakvinnan í føroyskum politikki í mong ár tók seg aftur sum forkvinna í Sjálvstýrisflokkinum.

Helst hevur Helena hevur roknað út, at hon fór at tapa móti avbjóðaranum Sámal Petur í Grund. Og heldur enn at skula tapa gjørdi hon so av at trekkja seg. Tað er stutt fráliðið, síðani hon rættiliga skelkað mátti fara frá sum landsstýriskvinna. Gjørdi hon tað ikki sjálv, fekk hon møguliga sekkin frá løgmanni. Og nú tykist søgan at endurtaka seg – heldur enn at fáa sekkin frá einum meiriluta av floksfeløgunum gjørdi hon av at trekkja seg.

Hvussu hon enn hevur dugað at telvað innanhýsis og í politikki sum heild, so skerst ikki burtur, at Helena Dam á Neystabø hevur megnað at seta Sjálvstýrisflokkin á dagskránna og gjørt flokkin til nakað meira og størri enn hann í veruleikanum er. Við síni avgjørdu, væltalandi og siðuligu framferð í miðlunum hevur hon klárað at fanga áhugan hjá fólki flest. Hon hevur so eisini verið í teirri hepnu støðu – í onkrum føri óhepnu – at hon hevur verið nærum einsamøll um at marknaðarføra flokkin og sjónarmið hansara.

NÚ verður spennandi at hoyra, um hon fer víðari og fyri triðju ferð tekur føroyingar á bóli: ger av at kvitta við flokkin og velur annan flokk. Tað er eingin loyna, at hóast ósamd í mongum, so liggja sjónarmiðini hjá Helenu Dam á Neystabø tættast upp at grundsjónarmiðjum Javnaðarfloksins, her bæði tá tað ræður um tey veikastu í samfelagnum og um sjálvstýri. Sámal Petur í Grund hinvegin er nógv meira tjóðveldissinnaður og tykist ikki at hava eins stóran áhuga fyri sosialum og útbúgvarmálum sum hon. Spurningurin er so, um brúgv kann byggjast um ta kluft, ið kom í millum Helenu og Javnaðarflokkin á sinni, og um hetta í heila tikið hevur áhuga fyri nakran av pørtunum.

Eingin ivi er um, at tað er ein dyggur smeitur fyri Sjálvstýrisflokkin, at Helena nú heldur ikki ætlar sær at stilla upp til fólkatingsvalið. Við tí avgerðini hevur hon gjørt luttøkuna hjá flokkinum til einkis. Flokkurin kann so brúka eitt katastrofalt fólkatingsval til at finna seg sjálvan aftur til løgtingsvalið. Um nýggi formaðurin megnar tað er so ein heilt annar spurningur.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Samgongan og landsstýri lumpa palliba framvegis

**Við skattalætta, eldrarøkt og yvirtøkum**

**Finnleif Guttesen**



**Skattalættin**
Landstýri gevur skattalætta við at hækka botnfrádráttin í kommunuskattinum, uttan eitt orð til kommunurnar.Kommunurnar fáa 30 mill minni í skatti og av hesum fær borgarin 40-50 kr. í skættalætta um mánaðin, sum ikki merkist í húsarhaldinum.

Um kommunurnar ikki mistu hesar inntøkur, kundi borgarin sæð og merkt nógv meira til hesar mistu inntøkurnar

At landstýri reypar av skattalætta sum onnur skulu gjalda, er at lumpa og villleiða palliba.

**Eldraøkið**
Kommunurnar hava yvirtikið barnaøkið, við at landi hevur yvirtikið ymiskar snøklar frá kommununum á pensións og eldraøkinum.

Nú ætlar samgongan aftur, at áleggja kommunum útreiðslur á eldraøkinum, tí hon vil ikki gjalda meira fyri hetta øki.

Tað er skuffandi at hoyra, at Javnaðarflokkurin sigur at teir skulu garantera, at landi skal gjalda líka nógv sum kommunurnar. Hvørjar kommunur hava ráð at byggja sambýlir, røktarheim og serdeildir til dement osv? Fyri at fíggja hesar byggingar og raksturin, má kommunuskatturin økjast munandi.

Eldraøkið er ein landsuppgáva, tí tað er so ymiskt hvussu nógv og hvar tørvur er á hesum økið, vónandi tekur Sambandsflokkurin undir við hesum.

**Yvirtøkan av skipaeftirlitinum**
Spyr smábátaeigarin um eitt ár, hvat hann skal gjalda fyri bátasýn, 2000 ella 5000 kr.?

**Yvirtøkan av kirkjuni**
Er kirkjufólki eftirspurt? Hví í allari víðu verð skal onkur í Tórshavn áseta kirkjuskattin, kláraðu kommunurnar tað ikki áðrenn?

# Danska stjórnarskráin og sjálvstýrismenn

**Zakarias Wang**



Viðhvørt verður ført fram, at tað ikki ber til hjá sjálvstýrismonnum at verða valdir inn á danating, tí at tað stendur í grein 32, 7. petti í donsku stjórnarskránni, at "Hvør tingmaður skal, tá ið val hans er góðkent, hátíðarliga játta at halda stjórnarskránna."

Ført verður fram, at teir sum eru sjálvstýrismenn virka ímóti hesi stjórnarskrá, tí tað skal vera í stríð við hana at Føroyar gerast eitt sjálvstøðugt ríki.

Hetta er fullkomuliga burturvið.

Sjálvt um tað verður sagt, at henda stjórnaskrá eisini er okkara stjórnarskrá av tí at vit eru innlimaði í Danmark, so er tað einki ið forðar fyri at Føroyar gerast eitt sjálvstøðugt ríki sambært reglunum í henni.

Hetta stendur greitt í 1. petti í 19. grein, har sagt verður, at kongur skal hava fólkatingsins undirtøku fyri at minka um ríkið. Við fólkatingsins samtykki kann hann tí gera tað, og eitt samt fólkating hevur sagt, at um so er, at vit vilja gerast eitt sjálvstøðugt ríki, so verður hetta einmælt samtykt í fólkatinginum.

Tað er ikki meir enn rætt og rímiligt, at sjálvstýrismenn sita á fólkatingi, tá ið ein slík avgerð sambært stjórnarskránni skal takast.

Men sjálvt um tað verður sagt, at danska stjórnarskráin ikki er okkara stjórnarskrá, so er tað eisini rætt at sjálvstýrismenn sita á fólkatingi og geva váttan um at halda donsku stjórnarskránna.

Okkara stjórnarskrá er tann, sum løgtingið samtykti tann 14. august 1662. Hon er galdandi her av tí, at vit ongantíð eru vorðin innlimaði í Danmark, men eru saman við hesum ríki sambært sáttmálan frá 29. august 1450. Hesin sáttmáli sigur, at vit eru eitt sjálvstýrandi ríki sum er á jøvnum føti við Danmark. Men ein av teimum skyldum, sum vit hava, er at senda fólk til Danmarkar at hjálpa teimum at stýra Danmark um so er at Danmarkar ríki heitir á okkum um at gera tað.

Tað er hetta sum Danmark hevur gjørt við at teir hava sett í 28. grein í sína stjórnarskrá, at 2 av teimum 179 fólkatingsumboðunum verða vald í Føroyum.

Vit kunnu í hvussu so er siga fyri vist, at hesi føroysku fólkatingsumboð ikki kunnu koma til Danmarkar og krevja av dønum, at teir ikki skulu halda ta stjórnarskrá, sum teir hava samtykt. Danska tjóðin hevur rætt til at skipa fyri sínum egnu viðurskiftum eins og vit hava tað, og eins og danir í Føroyum skulu halda lóg og rætt, so mugu okkara umboðsmenn í Danmark gera tað sama.

Fremsta lógin í Danmark er stjórnarskráin.Við at geva lyfti um at vit halda hana í Danmark verður tí undirstrikað, at danir hava samsvarandi skyldu til at halda okkara stýrisskipan í Føroyum.

Fremsta skyldan hjá føroysku umboðunum er at geva dønum ráð um hvussu teir skulu halda tær reglur, sum ásettar eru fyri samstarvið millum Føroyar og Danmark. Tað vil siga at danir skulu vera mintir á, at Føroyar og Danmark eru tvey javnbjóðis ríki, og at hvørki skal vera yvirmaður hjá hinum.

Satt at siga er tað ringt at síggja, hvussu aðrir enn sjálvstýrismenn kunnu megna henda setning á danatingi.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




## VIÐMERKINGAR

# Vilja byggja uppaftur tað sum er niðurbrotið

**Edmund Joensen**



Í Danmark roynir stjórnin at fáa valið at snúgva seg um uttanríkispolitikkin. Um kríggið í Afganistan og tað terrorvirksemi, sum byrjaði 11. september, og sum førdi við sær broytingar um allan heimin. Fíggjarlógina, innanlandspolitikkin og vælferðarsamfelagið roynir stjórnin at skúgva í bakgrundina soleiðis at valið verður eitt val um "vinn ella forsvinn" fyri stjórnina.

Andstøðan (teir borgarligu flokkarnir) sigur harafturímóti, at valið fyrst og fremst skal snúgva seg um dagligdagin hjá danska fólkinum, vælferðina, bíðilistarnar á sjúkrahúsum, eldrapolitikkin, innflytarapolitikkin, skattapolitikkin o.s.fr.

Andstøðan heldur ikki, at uttanríkispolitikkurin skal dominera valorrustuna, fyrst og fremst tí at flestu flokkarnir á fólkatingi í stórum eru samdir um tann rikna uttanríkispolitikkin. Allir eru samdir um at standa øksl móti øksl ímóti torrorismu í heiminum.

**Valstríðið í Føroyum**
Sjálvt um talan er um eitt fólkatingsval, so fer valstríðið í stóran mun at snúgva seg um tann heimliga politikkin, vælferðina hjá føroyingum, bíðilistar til sjúkrahús, bíðilistar til ellis- og røktarheim, eldrapolitikk í síni heild, pensjónir, skatt, um figggjarlógina sum aftur gevur stórt hall og mangt annað. Øll tey samfelagsøki, sum sitandi samgonga onki hevur gjørt við farnu skjótt 4 árini.

Valið fer sjálvandi eisini at snúgva seg um ríkisfelagskapin, tað viðferð og misrøkt, sum hetta landsstýri hevur hevur lagt fyri dagin á hesum øki. Tær brúgvar sum eru brendar, tey viðurskifti sum eru komin í ólag ella heilt steðgaði upp. Tað er torført at finna røttu orðini fyri hvussu hetta landstýrið og teirra umboð hava forpesta viðurskiftini Føroya og Danmarkar ímillum.

Hetta eru alt viðurskifti sum mugu fáðast aftur í rættlag. Henda uppgávan verður tann allar størsta hjá einum komandi sambandsumboði á Fólkatingi eftir valið 20 november.

Tað kann tykjast óneyðugt at siga frá, at føroyingar saman við tí demokratiska heiminum, standa øksl móti øksl ímóti terror og yvirgangi.

Harafturímóti er tað alneyðugt at siga frá, at føroyingar nú ætla at standa saman, tá teir stóru skaðar, bæði í viðurskiftunum innanlendis og innan ríkisfelagskapin, framdir av sitandi landsstýri og samgongu, skulu rættast upp aftur.

Hesi boðini kunnu føroyingar mannsterkir geva við at velja eitt sam-bandsumboð á fólkating 20. november.

# Fólkatingsvalið verður eisini um annað enn ríkisfelagsskap

**Atli Hansen**



Fyri ella ímóti at vera í ríki saman við Danmark og Grønlandi? So einkult er valið ikki. Tað snýr seg sjálvandi fyrst og fremst um hetta, men tað snýr so sanniliga eisini um tær avleiðingar, tað hevur fyri okkum at vera við í einum felagsskapi og at loysa uppgávurnar í felag. Tær skyldur og tey rættindi, vit hava.

Besta dømi um týdningin av hesum er gongdin í 80unum og byrjanini av 90unum. Í einum felagsskapi, men undir einum frælsi, sum varð okkum givið gjøgnum Heimastýrislógina, megnaðu vit at stýra landinum út av tí búskaparligu eggini og vit høvdu ongan møguleika fyri sjálvi at koma uppaftur. Landið var á húsagangi, kreditvirðið = 0, skuldin ovurhonds stór og vána útlit á øllum økjum fyri at fáa hjólini í gongd aftur.

Men her kom so tann ríkisfelagsskapur, sum er niðurlagdur í Heimastýrislógina, okkum til hjálpar. Danmark samlaði alla okkara uttanlandaskuld undir einum til marknaðarrentu, sprændi pening inn í okkara bankar og vinnulív og eftirgav okkum nakað av skuld.

Vit minnast øll, hvussu hetta gekk fyri seg. Og úrslitini lótu ikki bíða eftir sær.

Vit hava hesi seinastu 3 árini sæð, hvussu samgonguflokkarnir í fullveldistilgongdini mest hava roynt at eitra og forpesta viðurskiftini millum ríkisfelagsskapspartarnar - serliga millum Føroyar og Danmark. Teir hava lagt gift fyri allar samráðingar, áðrenn tær eru byrjaðar og hava so roynt at koppa ábyrgdina yvir á Nyrup. Úrslitini - ella rættati vantandi úrslitini hava verið hareftir. Einki er komið burtur úr nøkrum. Eitt valskeið er farið aftur um, uttan at samgongan hevur rokkið nakað sum helst av sínum málum.

Og víst koma vit at tosa um fullveldi ella loysing aftur til hetta vali. Eitt heilt valskeið við søguliga góðum búskaparligum møguleikum fyri at styrkja okkara samfelag er farið aftur við borðinum, uttan at nakað er gjørt. Fullveldi hevur køvt alt tosið um framburð og stovnfesting av okkara samfelag.

Frælsið og framburður er framvegis nakað, sum skal mennast í ríkisfelagsskapinum. Og tí koma vit eisini til at tosa um øll okkara viðurskiftir til eitt val í ríkiseindini: búskap, vinnu, almanna- og heilsuverki við øllum sínum trupulleikum, skúlaøki, pensiónir, skatt, mentanarøki o.m.a.

Jú her er nógv at tosa um.

Sambandsflokkurin fer á heystfundi um vikuskifti at viðgera støðuna og síðani at føra síni greiðu sjónarmið fram í einum siðiligum valstríði. Málið skal vera at fáa umboð aftur í Fólkatingið, so at tann føroyska røddin aftur skal hoyrast har.

# Úr søguni hjá Gamla Hospitali

**TÍÐINDASKRIV**

Færø Amts Hospital varð bygt í 1829 og var í nógv ár einasta sjúkrahús í Føroyum. Bygningurin er varðveittur, og farið verður nú undir at umvæla hann og seta hann í stand.

Í hesum sambandi heldur søgufrøðingurin Elin Súsanna Jacobsen fyrilestur um hospitalið og sjúkrahússøguni tey hundrað árini fram til 1924, tá ið Dronning Alexandrines Hospital varð bygt og gamla hospitalið selt.

Fyrilesturin verður týskvøldið tann 6. november kl. 19.30 á Landsbókasavninum.


-Góðir brúktir frá
REYNI SERVICE

**TOYOTA AVENSIS 2,0 TDI SOL** — Skrás.: 17-02-97 — Km.: 31.000 — Prísur: 175.600,- Garanti**
**TOYOTA COROLLA 1,3 TERRA L/B** — Skrás.: 30-09-98 — Km.: 52.000 — Prísur: 109.600 Garanti**
**TOYOTA CARINA E GLI** — Sýnaður 01-03 — Skrás.: 25-07-96 — Km.: 51.000 — Prísur: 113.600,- Garanti*
**TOYOTA COROLLA 1,6 XLI AUTOM.** — Skrás.: 16-01-97 — Km.: 64.000 — Prísur: 95.600,- Garanti*
**TOYOTA CARINA E 1,8 GLI** — Skrás.: 24-11-95 — Km.: 113.600 — Prísur: 105.600,- Garanti*
**HONDA CIVIC 1,4 H/B** — Sýnaður 01-03 — Skrás.: 15-05-97 — Km.: 57.000 — Prísur: 89.600,- Garanti*
**TOYOTA CARINA E 1,6 XLI** — Skrás.: 13-06-95 — Km.: 155.000 — Prísur: 84.600,- Garanti*
**FIAT MAREA 2,0 STATION** — Skrás.: 15-10-98 — Km.: 38.000 — Prísur: 145.600,- Garanti*
**TOYOTA CARINA 1,6 L/B** — Sýnaður 00-09 — Skrás.: 05-03-92 — Km.: 128.000 — Prísur: 49.600,-
**OPEL VECTRA 1,6 CD SEDAN** — Sýnaður 01-03 — Skrás.: 15-05-97 — Km.: 60.000 — Prísur: 79.600,-
**TOYOTA COROLLA 1,6 SEDAN** — Skrás.: 02-08-99 — Km.: 31.000 — Prísur: 124.600,- Garanti**
**FORD ESCORT 1,8 DIESEL** — Sýnaður 00-06 — Skrás.: 08-03-94 — Km.: 158.000 — Prísur: 48.600,-
**TOYOTA COROLLA 1,3 SEDAN** — Skrás.: 09-06-99 — Km.: 31.000 — Prísur: 119.600,- Garanti**
**OPEL ASTRA 1,7 DIESEL** — Sýnaður 01-02 — Skrás.: 31-03-94 — Km.: 176.000 — Prísur: 68.600,-
**TOYOTA COROLLA 1,6 SEDAN** — Skrás.: 25-01-99 — Km.: 52.000 — Prísur: 116.600,- Garanti**
**FORD MONDEO 2,0** — Sýnaður 01-04 — Skrás.: 04-01-96 — Km.: 80.000 — Prísur: 114.000,- Garanti*
**TOYOTA COROLLA 2,0 DIESEL** — Sýnaður 00-03 — Skrás.: 28-10-93 — Km.: 175.000 — Prísur: 76.600,- Garanti*

* Brúktir bilar yvir 75.000 kr. verða seldir við BRÚKTBILAVÁTTAN

** TOYOTA bilar hava 3 ára garanti frá fyrsta skrásetingar dato.

TOYOTA

VØRUVOGNAR

**MITSUBISHI L 300 VAN 4X4** — Skrás.: 23-12-96 — Km.: 145.000 — Prísur: 119.600,-
**MAZDA B-2500 PICK-UP** — Skrás.: 01-10-00 — Prísur: 132.600,-

STØKK INN Á GÓLVIÐ

REYNI SERVICE
Opið: Mán.-frí. 8.00-17.00
Vegurin Langi -188 Hoyvík - Tel. 313040
Sosialurin - 311820